## DAGSINS MEINING

### Merkisdagar hjá fiskimonnum

Tað eru í ár liðin 95 ár síðan Føroya Fiskimannafelag varð sett á stovn. Tað vóru fiskimenn í Gøtu, sum tóku stig til at stovna Føroya Fiskimannafelag, og verður í ársfrágreiðing formansins hesaferð eisini nomið við søgu felagsins. Greitt verður frá, at stigið til at stovna felagið varð tikið við einum brævi, sum í desember 1910 varð sent til fiskimenn um landið við áheitan um at virka fyri stovnan av einum felag fyri fiskimenn. - Arbeitt varð bæði skjótt og væl, tá ið havt verður í huga, at felagið varð stovnað longu 14. november 1911 – og at fyrsti sáttmáli við reiðarafelagið varð gjørdur longu í januar 1912, má ásannast, at arbeitt varð bæði skjótt og væl, sigur formaðurin.

Stovnanin av FF fyri 95 árum síðan er ein tann størsta hendingin í føroyskari yrkifelagssøgu. Fyri hesa hending vóru fiskimenn heilt uttan ta fíggjarligu og løgfrøðiligu verju, sum eitt yrkisfelag tryggjar sínum limum. Fiskimenn gjørdust við hesum undangongumenn í organiseringini av føroyska arbeiðsmarknaðinum. Nøkur ár seinni fingu teir fylgi av arbeiðsmonnum á Tvøroyri og í Tórshavn og soleiðis komu fiskimenn og løntakarar á landi at gerast partar av eini heimsfevnandi rørslu, sum enn tann dag hevur til endamáls at tryggja sínum limum manssømilig lívskor. Týdningurin av hesum kann ikki yvirmetast.

Tað er fastur táttur hjá Føroya Fiskimannafelag at halda landsfund millum jól og nýggjárs, tá ið flestu fiskimenn eru heima. Fundurin í ár varð hildin í Norðurlandahúsinum í gjár, og felagsformaðurin, Óli Jacobsen, hevur lagt fram ársfrágreiðing felagsins fyri farna ár. Á hvørjum ári letur felagið skriva og prenta snotuligan bókling, sum er ársfrágreiðingin fyri árið, sum fer.

Felagsformaðurin, Óli Jacobsen, hevur tveir merkisdagar í leiðslu FF´s nú 1. januar komandi ár. Tað eru liðin 40 ár, síðan Óli á fyrsta sinni varð valdur í felagsstjórnina í Føroya Fiskimannafelag sum sýsluformaður fyri Eysturoyar sýslu – og somuleiðis eru liðin 35 ár, síðan hann varð valdur til felagsformann. Øll hesi ár hevur Óli Jacobsen leitt felagið við stórum hegni, myndugleika og dirvi. Tað er ikki ov nógv sagt, at hesi árini hava fiskimenn vunnið stórar sømdir og hava fingið ta virðing og viðurkenning, sum henda samfelagstætt hevur uppiborið. Óli er kanska ikki samdur við okkum í hesum, tí hann setir alla tíðina nýggj og stór mál. Í hansara hugaheimi kemur eitt yrkisfelag ongantíð á mál, tí málini mugu alla tíðina stillast eftir teimum sera skjótt skiftandi samfelagsviðurskifunum. Fiskimenn eiga í Óla ein góðan talsmann. Hóast hann mangan er bersøgin og enntá kann tykjast harðligur, hevur hann vunnið flestu og størstu sigrarnar við samráðingarborðið. Hetta er væl tað besta, ið kann verða sagt um ein fakfelagsleiðara.

Men Óli er eisini samfelagsdebattørur og hevur mangan við sínum hvassa penni og sterku og greiðu sjónarmiðum sett fokus á skeivleikar í samfelagnum. Og sum formaður og samfelagsdebattørur hevur Óli mangan staðið í andgletti og fingið manga skoluna omanyvir seg frá teimum harðmæltu á samfelagsins uttastu politisku veingjum. Hetta er ein ótakksamur og einsamur leiklutur, sum Óli hevur átikið sær. Hinvegin hevur tað avgerandi týdning fyri fólkaræðið og framsøgufrælsið, at nøkur fólk hava dirvið og áræði at átaka sær henda ótakksama leiklut. Ein kundi ynskt, at fleiri høvdu sama dirvið og sama seiggið. Fiskimenn og føroyingar yvirhøvur hava formanni Fiskimannafelagsins gjøgnum 35 ár nógv fyri at takka, og vit her á blaðnum ynskja bæði felag og formanni tillukku og góðan byr.

**Sosialurin**

# Væl er vignast og stór tøk tikin




Vit eru komin til ársenda og kunnu nú líta aftur á eitt hendingaríkt ár. Úti í heimi hava kríggj, ófriður og vanlukkur ofta staðið ovast á breddanum. Vit eru í so máta sloppin hampiliga væl í Føroyum, hóast okkurt nosið hevur verið. Hóast búskaparliga støðan kundi verið betri, hevur árið sum heild gingið væl. Fiskaprísirnir lagaðu seg hampiliga væl sum leið út á árið og flestu hendur hava arbeiði. Politiskt er eisini nógv hent, sum kann fáa stóran samfelagsligan týdning sum frálíður.

Í skrivandi stund eru nýggjárshagtølini ikki kend, og tí ber ikki til at siga, hvussu statt er hjá høvuðsvinnuni. Tó ljóðar, at hjá flakavirkjunum hevur ikki gingið væl, og nógv fiskavirki hava trupult við at fáa endarnar at røkka saman. Fiskaprísurin er høgur og kappingin frá útlendskum fiskakeyparum er stór. Kapping er góð, verður oftast sagt, og førosykir fiskakeyparar vilja sjálvandi eisini vera við í hesi kapping. Kappingin var ikki „fair", men roynt hevur verið at steðga proforma-sølunum í árinum.

Hvussu skipini hava klárað seg er ikki greitt, men eftir eini grein í blaðnum hósdagin at døma, og sum hagtølini hjá Fiskimannafelagnum prógva, gongur ikki væl hjá pørtum av flotanum. Hugsað verður her um línuflotan. Ísfiskalínuskipini hava ikki fingið nógv burturúr, og manningarparturin er komin so langt niður, at tað loysir seg næstan ikki at vera við. Tað er harmiligt, tí línufiskiskapurin skuldi verið góður fiskiháttur, tá tað snýr seg um góðsku og burðardygd. Betri er gingið hjá smærru og størru ísfiskatrolarunum, eins og hjá flakatrolarum og nótaskipunum, sum hava sett met hvat inntøku hjá fiskimonnum viðvíkur.

Politiskt hevur árið verið merkt av týðandi lóggávu, tá tað snýr seg um ríkisrættarligu støðuna. Í semju við danir hava vit fingið eina yvirtøkulóg, sum lættir um mannagongdina, tá mál skulu yvirtakast. Harafturat kemur uttanríkispolitiska heimildarlógin, sum gevur okkum víðari ræsur í altjóða høpi, og tá tað um snýr seg um at gera avtalur við onnur lond.

Í hesum málum hevur andstøðan, sum hon eisini skal, sett stór spurnartekin. Serliga hevur andstøðan funnist at uttanríkispolitisku heimildarlógini. Uttan iva hevur andstøðan rætt í summum atfinningum, men í komandi tíðum sleppur so heimildarlógin so at standa sína roynd.

Hóast tað mangan leikar hart á millum samgongu og andstøðu, slepst ikki uttan um at staðfesta, at vit hava fingið rættiliga støðug politisk viðurskifti. Tað skuldi givið landsstýri og løgtingi høvi at hugsa um onnur samfelagslig viðurskifti enn afturvendandi toganina um ríkispolitisku støðuna.

Nógv tøk eru eftir at taka, tí øll liva ikki á sólsíðuni, og tíverri tykist gjógvin ímillum samfelagsbólkarnar ikki at minka. Tíverri drukna nógvir av teimum grundleggjandi spurningum um livikor og lívsinihald í øllum tosinum um tunnlar og einksiljingar. Her eiga okkara fólkavaldu at taka annað skinn um bak.

Við hesi ámming ynskja vit øllum Føroya fólki eitt gott og eydnuríkt nýggjár.

**Sosialurin**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.